Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Karlot Hergeirsson, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Sjóvegis flutningsskyldan hjá landinum

Spurningar:

1. Hvør er orsøkin til, at landið ikki klárar at halda sína flutningsskyldu ímillum oyggjar, sum er áløgd landinum sbrt. løgtingslóg um fólka- og farmaflutning?
2. Er orsøkin, at veðrið háttar sær øðrvísi nú enn fyrr, at Strandfaraskip Landsins hava gjørt nýggjar váðametingar, at skipini eru eldri og ótíðarhóskandi ella tí, at skipini ikki eru egnað at sigla tær farleiðir, sum tey eru sett inn á?
3. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera við hetta og nær?

Viðmerkingar:
At veður og vindur, serliga á vetri, kann hava sína ávirkan á at halda regluligt sjóvegis samband í millum oyggjar, tað vita vit føroyingar og skilja vit, men nú síggja og merkja vit oftari og oftari broytingar og avlýsingar á oyggjaleiðum, eisini nú um summarhálvuna, og hetta kemur serliga til sjóndar, tá skip vera flutt runt, tí okkurt skip er á sleipistøð. Hetta kann førur til stóran miss hjá fólki, sum ferðast til og frá arbeiði við skipum hjá SSL og hjá ferðavinnuni og vinnuni sum heild, sum hava ringt við at halda sínar skyldur og avtalur.

Á Løgtingi, 30. mai 2023

Karlot Hergeirsson